


*Fiskaprísurin hevur verið góður í seinastuni*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Janus slær tó fast, at hetta við útróðri vestanfyri ikki hevur verið so vanligt hjá teimum. Takkað verið teimum góðu umstøðunum at sleppa fram og aftur millum heim- og avreiðingarstað, er hetta ein einføld og góð loysn.

Teir vóru í Vágahavinum hesa hósnáttina og vóru eisini á somu leið dagin fyri. Talan er um eina leið, sum liggur einar sjey fjórðingar úr landi – við Botnaskiftið, sum útróðrarmenn kalla tað.

## Toldi ov lítið av

Henda hósmorgunin var væl av fiski á dekkinum.

– Eg meti, at vit hava fingið eini 5000 pund í nátt, sigur Janus.

Dagurin frammanundan royndist nakað væl betri, tí tá høvdu teir 10.500 pund. Men tað hevur eisini sína orsøk:

– Tað er sjálvandi altíð ójavnt, tá ein tosar um útróður.

– Men kanska toldi tað ov lítið av, tá vit soleiðis fóru aftur á sama staðið, sigur Janus, við greiðari ábending um, at góða veiðan tann fyrra dagin mundi taka ein stóran part av fiskinum á hesi leiðini.

## Styttri at sigla

So skjótt teir komu at landi var øll veiðan hivað yvir í lastbilin, sum løtu seinni fór til Sørvágs við henni.

Teir tríggir umborð fóru síðani við bátinum yvir um land, har teir løgdu seg fyri dagin. Ætlanin var at fara avstað aftur um kvøldið.

– Vit fara inn her á Miðvág, tí higani er stutt í Vágahavið, – bert ein tími ella so. Soleiðis spara vit nógva tíð í sigling, sigur Janus.



*Higani úr Miðvági er bert ein tími til Vágahavið. Janus Sørensen er skipari*
*Mynd: Jens Kr. Vang*